## DAGSINS MEINING

# Hvør skal granska?

Gransking verður, sum púra beint er, ført fram sum eitt lyklaorð í hesum døgum. Tað er positivt, at Føroya Landstýri signalerar, at nú skal gransking takast í álvara. Tað er ein sannroynd, at um eingir pengar verða brúktir til gransking, so er stagnatión fyri framman.

Gransking fevnir sera vítt. Summi granska í skaldskapinum hjá onkrum rithøvundi, onnur í gomlum nøvnum, meðan aftur onnur upfinna pumputøkni og nýggj trol. Tað er alneyðugt, at tað almenna, fyriuttan at seta gransking ovast á breddan, eisini raðfestir, hvørjum granskast skal í. Tað er nú einaferð so, at øll gransking kann ikki javnsetast, tí okkurt er luksusgransking. Ikki tí, pláss skal eisini verða fyri hesum, og einum og hvørjum stendur frítt at granska í tí, ein vil, men spurningurin er, um tað almenna skal gjalda eina milliónaupphædd til slíka gransking. Í hvussu so er, so eigur man politiskt at gera upp við seg sjálvan, hvussu raðfestast skal við pengingaliga tilfeinginum, ið nú einaferð er avmarkað.

Um vit hyggja tvørturum Atlantshav, so síggja vit, at gransking har í ein sera stóran mun er problemloysing. Fyritøkur hava okkurt ynski ella onkran trupulleika, og so gjalda tey lærustovnum og granskarum fyri at granska í hesum fyri at fáa eitt úrslit, ið kann kommersialiserast.

Føroyska vinnan hevur ikki granskað nógv, hóast einkultar av størru fyritøkunum í okkara høvuðsvinnu hava brúkt eitt sindur av orku til hetta. Fyri smærru vinnufyritøkurnar er ofta tað galdandi, at tær hvørki hava tíð, ella umstøður til at granska. Her er tað, at landið kann gera seg galdandi. Um landið kann skapa karmar, so at smærri fyritøkur kunnu fáa fysiskar umstøður og fakligan íblástur til at granska, so gerst tann gáttin at byrja at granska ikki so høg hjá einari minni fyritøku.

Fyri at føroysk gransking skal kunna taka dik á seg, er tó týdningarmikið, at man integrerar lærustovnar í hesa ætlan so tíðliga sum møguligt. Tá nú ein nýggjur fiskivinnuskúli verður bygdur, so er upplagt, at hesin skúli - eins og t.d hægru útbúgvingarnar á Tekniska Skúla - skal brúka part av tíðini til problemsloysing hjá vinnuni. Tað er umráðandi at hugburðin, har man brúkar ungt fólk til problemloysing kemur inn so tíðliga sum møguligt, bæði fyri ungdómin sjálvan og fyri vinnuna.

Um granskingin verður ov eliter, so kemur einki burturúr. Sjalvandi skulu PhD projektir til á hátøknuliga økinum, men tað er tíð uppá at revidera okkara skipan. Danskir og harvið eisini føroyskir PhD lesandi eru betýðiligt eldri enn PhD lesandi í Bretlandi og USA og profilarnir eru ofta tilkomið fólk í undirvísingarstørvum, heldur enn bjørt ung studerandi um 20 ára aldur sum vanligt er í USA og Bretlandi. Ein annar munur er, at størsti parturin av PhD'unum í Bretlandi og USA fara beint út í vinnuna við sínari vitan, og ikki sum her, har einans fá av hesum fólkum enda í vinnuni. Hetta er sjálvsagt nakað, sum bæði vinna og tað almenna eiga at analysera, tí feilurin liggur helst hjá báðum.

Nú er so hol komið á kjakið, og nógvar meiningar eru. Vónandi fer komandi tíðin at beina okkum inn á vinnandi kósina.

**Sosialurin**

# Bátur til bjarging fer at gera mun

*Marius Magnusson, formaður fyri Norðoya Bjargingarfelag, frammanfyri nýggja bjargingarbátin. Seinastu dagarnar hava teir gjørt venjingar í Aith í Hetlandi.*

*Mynd: Shetland News Agency*



**– Fyrr hava vit mugu leigað bátar, og tú veitst ongantíð, hvussu teir rigga til eina uppgávu. Nú hava vit okkara egna bát, og vit fara at kenna styrki og veikleikar hjá honum, sigur Marius Magnussen, formaður fyri Norðoya Bjargingarfelag, nú felagið hevur keypt sær ein serliga bygdan bjargingarbát úr Onglandi**

BJARGINGARBÁTUR
*Pete Bevington, Shetland News Agency*

**Aith, Hetland:** Tann fyrsti serliga bygdi bjargingarbáturin, sum føroyingar nakrantíð hava átt, er farin úr Hetlandi við kós ímóti størstu fiskivinnuhavnini í Føroyum.

Sjálvbodni felagsskapurin úr Klaksvík fekk til vega meira enn hálvaaðru milliónir krónur til at keypa 20 ára gamla bjargingarbátin Newsbuoy frá Royal National Lifeboat Institute (RNLI).

RNLI, sum heldur til í Poole í Dorset, selir sínar gomlu Arran bjargingarbátar og skal endurnýggja flotan við nýggjari og betur útgjørdum Trent and Severn bátum.

Í Føroyum er eingin líknandi felagsskapur sum RNLI, og Norðoya Bjargingarfelag, sum heldur til í einum øki við 6.000 fólkum, hevur brúkt bátar hjá øðrum í sambandi við neyðtilburðir.

Formaðurin í Norðoya Bjargingarfelag, Marius Magnusson, sum í síðstu viku fleyg til Onglandi við trimum øðrum monnum, sigur, at nýggi báturin kann kollvelta bjargingartænastuna í økinum.

– Fyrr hava vit mugu leigað bátar, og tú veitst ongantíð, hvussu teir rigga til eina uppgávu. Nú hava vit okkara egna bát, og vit fara at kenna styrki og veikleikar hjá honum, sigur Marius Magnussen, sum eisini er leiðari við Trygdarmiðstøðina í Klaksvík.

### Verður brúk fyri slíkum báti

Tað koma alsamt fleiri stuttleikabátar til Føroya, og tí kann tað gerast brúk fyri einum slíkum bjargingarbáti, sum Norðoya Bjargingarfelag hevur keypt. Longu í ár hava tað verið fimm tilburðir, har Norðoya Bjargingarfelag hevur verið við til at hjálpa.

Manningin umborð á nýggja bjargingarbátinum, sum hevur fingið navnið Ziska, hevur seinastu tríggjar dagarnar hildið til í Aith, har ein støð fyri bjargingarbátar er. Har hevur føroyska manningin gjørt venjingar saman við hetlendsku manningunum, og teir hava fingið nógv at vita um, hvussu teirra nýggi bátur riggar.

Menninir í Aith kenna væl Newsbuoy, tí teir hava arbeitt umborð á honum í sambandi við hendingina, tá ið grikska farmaskipið Argomar í 1997 rendi á land í Hetlandi.

– Hesin báturin fer at gera stóran mun hjá teimum. Hvussu teir hava klárað seg uttan ein slíkan bát er óskiljandi, og vit eru eisini fegnir um, at vit hava kunna víst teimum, hvussu báturin riggar, sigur skiparin Hylton Henry, sum starvast á bjargingarstøðini í Aith.

– Báturin er sera væl egnaður til bjarging. Hann er væl bygdur, hann er tryggur, og hann fer at tæna teimum í nógv ár, sigur hann.

### Til Klaksvíkar leygardagin

Nýggi bjargingarbáturin hjá Norðoya Bjargingarfelag hevur tveir 500 hesta Caterpillar motorar og kann sigla 18 míl. Báturin er ein av nógvum bátum, sum RNLI hevur selt til lond sum Ísland og Kina.

Fyrradagin fór Ziska skúmandi avstað við kós ímóti Føroyum, og hann skal eftir ætlan koma til Klaksvíkar fyrrapartin leygardagin, tá ið Sjómannadagur verður hildin í Klaksvík.

Tjaldrið og Triton skulu fylgja Ziska til lands, og røða verður hildin í sambandi við, at báturin kemur til Klaksvíkar.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.